

dugnaligir lærarar, hildið livandi frásøgukynstrið innan skúlans gátt. Saman við Sonna Smith hevur hann eisini ríkað vitanarhungrandi útvarpslurtarar.

Tá sendirøðirnar vórðu útvarpaðar, vóru útlendskar sendirásir, so sum National Geografic við tallerkennekarum, ísbjarnum og indiánarum als ikki gerandiskostur í føroysku stovunum. So tey forvitnu máttu antin lesa sjálvi ella tendra útvarpið, tá sendingarnar um heimsins fólk fóru í luftina. Onkur vildi kanska sagt, at hetta var fólkaupplýsing, tá hon er best.

– Eg veit, at sendingarnar hava ofta verið brúktar til undirvísingarbrúk, sigur Sonne Smith, sum eisini væntar, at bókin við søguni um jødarnar fer at verða brúkt í skúlunum.

## Tá fullir menn ringja

Sjálvandi minnast teir báðir aftur á fleiri stuttligar og løgnar hendingar, sum komu í hjalarvørrinum á sendingunum.

– Til dømis ta ferðina, vit tóku upp um Saan fólkið, sum er upprunafólk í sunnara parti av Afrika. Í sendingini hugleiðir Hans um heitið 'bush men', sum hann skemtandi umsetur til 'runna-blámenn', minnist Sonne Smith, og skundar sær at skoyta upp í, at hann altso ikki klipti tað burtur úr sendingini.

Fólk um tað heila land funnu útav, at Hans Holm visti næstan alt, so tað kom meiri enn so fyri, at tey ringdu til hansara og spurdi um ymiskt – eisini á miðjari nátt.

Til dømis fullir menn, sum ringdu klokkan fýra á morgni, tá selskapið var farið at kjakast um eitthvørt.

– Eg bleiv sjálvandi skakkur, tá telefonin ringdi á náttartíð, tí kanska var okkurt hent við børnunum, minnist Hans Holm, sum tó altíð royndi at svara sum frægast.

– Ja, eg havi altíð roynt at vera hampiligur við fólk.

Men har minnir Sonne líka á eina stuttliga søgu, sum gongur um vinmannin. Tað var ein næmingur, sum spurdi um eitthvørt, sum Hans ikki visti. So svarið bleiv bara: "Hvar fanan skal je vita tað frá?"

## Vitan og áhugi fylgjast

Sambært Sonna er eyðkenni við Hans Holm, at hann veit heilt ómetaliga nógv.

– Hann hevur altíð eitt stutt og greitt og intellegent svar. Og um hann ikki kennir svarið, so sigur hann eisini tað, fortelur Sonne Smith, sum altíð sjálvur hevur dámað væl at lisið um og at ferðast í øðrum londum.

– Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri kunningarfakunum, landalæru, søgu og altjóða politikki. Líka frá barni av, minnist hann.

Hans Holm hevur eina útbúgving innan geografi og lívfrøði frá Københavns Universitet. Og so hevur hann altíð lisið eina asins rúgvu, sum hann málber seg. Men hann er vísur í, at um fakið etnografi hevði verið til, tá hann fór at lesa, hevði hann valt tað.

– Tá mettu fólk, at geografi var eitt breyðleyst studium. Men so kom lærugreinin brádliga inn á hægru útbúgvingarnar, og so var knappliga mangul upp á geografilærarar, forklárar hann.

## Onki skrøgg

Spurdur, hvussu hann ítøkiliga fyrireikaði seg til sendingarnar, greiðir hann frá, at teir valdu okkurt evni, sum hann hevði lisið nógv um.

– Og so dubultkannaði eg altíð tað faktuella beint áðrenn. Eg orki ikki fyri, tá fólk bara siga, at tey halda okkurt. Fakta skal vera upp á pláss. Eru ymsar meiningar um fakta, so nevni eg altíð, hvaðani upplýsingarnir stava, sigur Hans Holm.

Ein partur av tilgongdini í sambandi við bókaútgávuna hjá Sonna Smith hevur verið at leita fram myndir og at skriva myndatekstir.

– Hetta arbeiðið hevur prógvað fyri mær, at Hans skrøggar ikki, tá hann fortelur. Eg eri komin fram á somu fakta sum hann í hesum arbeiðinum, sigur Sonne Smith, sum møguliga fer at geva røðina um indiánarar í Norðuramerika út í bók eisini.

– Ikki fyri at reypa. Men eg minnist, at Uni Arge einaferð segði, at hesar sendingarnar eru legendariskar. Og tað taki eg sum eitt kompliment, sigur Sonne Smith.